Fullu ov langt aftur

Landsli›svenjarin helt eftir dystin, at føroyska li›i› lat seg tr‡sta alt ov langt aftur á vøllin, eftir at dreymabyrjanin var› fingin til høldar

JÁKUP MØRK

Tá tú gert tr‡ brotsspørk í einum dysti, er okkurt heilt gali›, heldur Allan Simonsen

Mynd: Álvur Haraldsen

Ein tann størsti spurningurin undan dystinum móti Sveis var, um Allan Simonsen fór at hava ein ella tveir mans á toppinum.

Endaliga stø›an gjørdist, at talan bert var um ein áleypara, og fleiri eru av teirra ásko›an, at hetta var skeivt.

Sjálvur helt venjarin tó ikki, at talan her var um eina skeiva avger›, og orsøkirnar til avger›ina vóru eisini fleiri.

– Vit hava jú á›ur spælt vi› bæ›i einum og tveimum áleyparum, og hvønn møguleika man velur, vil so sjálvandi ver›a mett um til hvønn einstakan dyst.

– Í hesum føri rokna›u vit fyri vist, at teir fóru at spæla vi› tveimum ella nærum trimum áleyparum, og ta› gjørdu teir eisini, tí Sesa, sum spældi høgru megin á mi›vøllinum, var sera framrætta›ur. Ta› gjørdi so, at vit høvdu tørv á einum eyka verjuleikara, ella verjukendum mi›vallara, og har valdi eg so at geva Johan møguleikan. Eg haldi eisini, at hann hev›i uppibori› møguleikan, samstundis sum eg eisini fegin vildi síggja hann í hesum leiklutinum.

– Harumframt høvdu vit eisini sæ› dystin millum Russland og Sveis, har Russland stó› sera væl vi› einum áleypara, tí teir tá fingu fult tamarhald á mi›vøllinum.

Í so máta hevur venjarin rætt í, at føroyska li›i› á pappírinum gjørdist sterkari á mi›vøllinum. Trupulleikin var tó, at ta› ongantí› eydna›ist okkara monnum at fáa nyttu úr yvirtalinum.

– Tri›ja orsøkin var so, at Todi ikki var tøkur, og at hetta sjálvandi vi›førdi, at álop okkara ikki var so sterkt, sum ta› onkran dyst hevur veri›.

Fullu ov langt aftur

Allan Simonsen vísti tó á, at ta›, at hann hev›i valt at spæla vi› einum áleypara, als ikki merkti, at føroyska li›i› skuldi leggja seg so langt aftur á vøllin, sum teir gjørdu.

– Ætlanin var, at vit skuldu spæla okkara spæl á mi›vøllinum, ha›ani Julian so skuldi royna at gera nakrar av sínum longu renningum ni›an í álopi›.

– At byrja vi› riggar hetta eisini, og vit fáa jú eisini eina dreymabyrjan, tá John skorar. Ta› sum tá hendi var›, at vit løgdu okkum alt ov langt aftur á vøllin, solei›is at vit ikki fingu spælt bóltin ni›an. Ta› merkti eisini, at vit als ikki komu ni›an at pressa teirra mi›vallarleikarar, og ta› ver›ur tú eisini revsa›ur fyri.

– Ta› hevur eisini naka› at gera vi› ta›, sum fyriferst í høvdunum á leikarunum, tí frá teirri løtu, at vit koma á odda, ver›ur bert hugsa› um verjuspæl.

At talan var um ein kollektivan ni›urtúr, var venjarin eisini partvíst samdur í.

– Ta› er kanska eitt sindur ringt at siga, men ta› var eins og spælararnir ikki vóru nóg fokusera›ir til uppgávuna. Tá tú gert tr‡ brotsspørk í einum dysti, er okkurt heilt gali›, og eisini tá teir fáa fyrsta máli› sova vit í verjuni. Tú kanst jú sammeta hetta vi› dystin móti Slovenia, har allir mans stríddust saman í 90 minuttir. Ta› hendi ikki hesu fer›, og ta› hongur kanska eisini saman vi›, at nakrir av leikarunum tykjast heldur slitnir, eftir eitt langt og strævi› kappingarár.

Gongdin er positiv

Eitt, sum eisini tóktist merkisvert, var, at føroyingar at kalla dekka›u mann til mann um allan vøllin. Eitt nú hev›i Allan Mørkøre stórar trupulleikar í sí›uni, tí hann alla tí›ina var› drigin inn í vøllin av mótstø›umanninum. Naka› sum vi›førdi stór hol í verjupartinum.

Til hetta seg›i Allan Simonsen, at uppleggi› til dystin, var, at Allan og Sámal skuldu verja fyri í høgra bor›i›. Sum so var eg líka gla›ur um, hvør tók bakkin, tá hann so kom framvi›, bara hann var› tikin.

– Móti russum kom bakkurin hjá teimum sjáldan framvi›, og tí ætla›i eg eisini, at so leingi hann ikki kom, skuldi Allan eisini hjálpa til inni á mi›vøllinum. Talan er sostatt um sama trupulleika, sum eg nevndi á›ur, tí vit fingu ongantí› fatur á teirra mi›vallaranum.

– Ta› er bara solei›is hjá okkum, at vit ikki hava rá› til, at onkrir spælarar ikki spæla upp til sítt besta. Skulu vit hava gó› úrslit, er altí› ney›ugt at allir mans eru 100% til rei›ar, og ta› vóru teir so ikki hesu fer›. Seinasta dømi› um hetta er helst dysturin móti Jugoslavia, sum vit spældu á heimavølli. Tá vóru vit illa skipa›ir, og vit taptu eisini stórt.

– Eg eri tó sannførdur um, at positiva gongdin, sum vit hava hildi› seinnu árini, framvegis stendur vi›. Av og á fáa vit okkurt bakkast, men samanumtiki› er talan um eina positiva gongd. Ta› skerst tó ikki burtur, at talan er um ein ke›iligan enda á kappingarárinum, men ta› skal eisini leggjast afturat, at sum dysturin leygardagin laga›i seg, eri eg fegin um, at vit ikki skulu til Jugoslavia at spæla mikudagin.

– Lat meg bara siga at enda, at hóast hetta, so hava vit ikki á nakran hátt mist trúnna á egna mátt okkara. Vit vita, hvørjum vit standa fyri, men av og á koma onkur bakkøst, og solei›is vil ta› altí› vera, seg›i Allan Simonsen at enda.

Skulu vit hava gó› úrslit, er altí› ney›ugt at allir mans eru 100% til rei›ar

Mynd: Álvur Haraldsen

Sinniliga undirskoti› er størsti bágin

Frágrei›ingin, sum hevur veri› brúkt um stórtapini seint á árinum seinnapartin av níti árunum, kann bara lutvíst brúkast

Frá teirri løtu, at Føroyar komu á odda, var› eitt stórt tr‡st lagt á føroyska máli›, og føroyska spæli› fekst als ikki at rigga eftir hetta

Mynd: Álvur Haraldsen

Ta› skerst illa, tá fótbóltslandsli›i› roynir seg seint á heystinum. Hetta er ein útsøgn, sum leygardagin aftur fekk eina skor›u undir seg. Men frágrei›ingin, sum hevur veri› brúkt um tapini seint á árinum, kann bara lutvíst brúkast longur, og ta› er ivasamt, hvussu nógv er í henni. Ta› er rætt, at summir spælarar hava lílta dystarvenjing, men ta› er bara ein partur av frágrei›ingini. Hin parturin – og ta› er uttan iva tann t‡dnigarmesti – er, at ta› framvegis er alt avgerandi, hvussu spælararnir eru tuna›ir inn á einstøku uppgávuna.

Sí›ani Allan Simonsen í 1994 gjørdist venjari, hava føroyingar fleiri fer›ir lagt rygg til stór tap á útivølli seint á árinum. 12. oktober í 1994 vann Skotland 5-1 á Hampden Park í Glasgow og 16. november sama ári› vann Finnland 5-0 í Helsingfors.

– Føroysku spælararnir hava onga dystarvenjing so seint á árinum, og teir eru sinniliga farnir í vetrarfrí fyri langari tí› sí›ani, var› frágrei›ingin.

Í 1995 var sama skili› ni›ri á Kreta. Grikkaland vann 5-0, øll málini vór›u skora› seinasta hálva tíman, og tí var upplagt at brúka somu frágrei›ingina sum ári› frammanundan.

Í 1996 var› sí›sti dysturin taptur 3-0. Ta› var 23. oktober í Slovakia. Úrsliti› var ikki hildi› at vera púra burturvi›. Henda metingin komst av, at landsli›i› 6. oktober á Svangaskar›i hev›i tapt 8-1 ímoti Jugoslavia. Ta fer›ina var tosi› um dystarvenjing og sinniligt undirskot brúkt. Eftir tapi› í Zürich er upplagt at sammeta avriki› vi› henda dystin ímóti Jugoslavia og vi› tann í Estlandi 4. juni í 1998. 5-0 tapi› ta fer›ina er ta› størsta tey seinastu árini.

Seinasti dysturin í 1997 var eitt undantak frá tí omanfyri nevnda. 11. oktober var landsli›i› í Gijón í Spania, og úrsliti› var 3-1 til heimali›i›. Føroyska li›i› átti stóran hei›ur av tí avrikinum. Spælararnir vistu, at teir stríddust ímóti einum stórveldi, teir góvu seg meiri enn eitt hundra› prosent, og ta› sást aftur í avrikinum og úrslitinum.

Í 1998 enda›i landsli›sári› vi› fer› til Litava og Skotland. Dystirnir vór›u spældir ávikavíst 10. og 14. oktober. Úrsliti› í Litava var 0-0, og í Skotlandi var heimali›i› heppi› at vinna 2-1. Talan var sostatt um tvey frágera gó› úrslit hjá føroyska li›num.

Men hagtølini siga ikki allan sannleikan um dystirnar. Leygardagin var tr‡sti› á føroyska máli› sera stórt, og Sveis fekk í 1. hálvleiki f‡ra mál.

Tá føroyingar fyri tveimum árum sí›ani vóru í Litava, var sjónvarpi› vi›. Tíverri var einki samband til Føroya fyrra partin av 1. hálvleiki. Men tey, sum vóru vi› á fer›ini, og tey, sum hoyrdu frásøgnina í útvarpinum, munnu minnast, at tr‡sti› á føroyska máli› fyrstu løtuna ta fer›ina var sera stórt.

Litavar høvdu fleiri upplagdar møguleikar at gera mál. Teir fingu einki mál, tí teir vóru ikki nóg neyvir, og tí at Jákup Mikkelsen vardi máli› heilt framúr væl. Høvdu teir havt skora› tvey ella tr‡ mál hesa løtuna, hev›i veri› upplagt at brúkt frágrei›ingina um lítla dystarvenjing.

Hava ikki vetrarfrí

Í fjør enda›i landsli›sári› í Prag. Kekkia vann 9. oktober 2-0. Føroyska avriki› var fínt, og eingin tosa›i um, at spælararnir sinniliga vóru farnir í vetrarfrí.



Leygardagin vóru vit vitni til, at landsli›sári› enda›i vi› líti› hugaligum stórtapi. Ta› tóktist, sum um nógvir spælarar vóru sinniliga farnir í vetrarfrí. Men ta› er vert at leggja til merkis, at ein størri partur av li›num enn nakrantí› á›ur var ikki farin í vetrarfrí, tá sí›sti dysturin var á skránni.

Teir, sum hava veri› í Íslandi í ár, hava ikki spælt í fleiri vikur. Leygardagin sást, at hetta er ein trupulleiki. Teir, sum spæla fótbólt í Noregi, eru ikki farnir í vetrarfrí. Komandi vikurnar skulu teir strí›ast fyri at fáa fulla úrtøku burturúr langa kappingarárinum. Í Sveis tóktust teir vera mó›ir og slitnir. Ta› var ein trupulleiki fyri landsli›i›, og ta› kann komandi vikurnar gerast ein trupulleiki fyri Sogndal. Hjá teimum tykist trupulleikin ikki vera, at kappingarári› er li›ugt, men heldur at ta› hevur veri› ov langt.

Tríggir spælarar úr superliguni vóru á vøllinum leygardagin. Teir skulu spæla ein lítlan mána› afturat, á›renn teir fara í vetrarfrí. Avrikini hjá teimum leygardagin bo›a›u ikki frá, at hetta ver›ur nakar trupulleiki.

Heimligu spælararnir eru farnir í vetrarfrí. Teir stó›u seg misjavnt í Sveis. Øssur ver›ur sagdur at hava sta›i› seg serliga væl, men hann hevur ikk vant meiri ella minni enn hinir. Tí ber ikki til at gera nakra serliga ni›urstø›u um trupulleikarnar, sum heimligu spælararnir hava seint á árinum.

Mótstø›uli›i› stóran t‡dning

Úrtøkan er sjálvandi mest av øllum tengd at, hvørjum li›i ta› ver›ur spælt ímóti. Ofta hevur veri› tiki› til, at bestu mána›irnir til landsdystir hjá Føroyum eru juni, august og september.

Ivaleyst eru hetta mána›irnir, tá føroysku spælararnir eiga at vera best fyri, og hetta eru mána›irnir, tá ve›ri› til fótbólt er best í Føroyum. Men hagtølini vísa ikki, at hetta eru mána›irnir, tá ta› hevur ligi› best fyri. Í september eru higartil spældir 13 dystir, í august 10 og í juni 9. Føroyingar hava vunni› ein dyst í hvørjum av hesum trimum mána›unum, og málmunurin hevur heldur ikki veri› at reypa av. Í september er hann 6-45, í august 8-20 og í juni 5-22.

Føroyingar hava spælt eina fer› í januar – 0-1 ímóti Finnlandi í ár – og eina fer› í mars – 0-0 ímóti Andorra í fjør. Tann mána›in, tá ta› annars higartil hevur roynst frægast hjá landsli›num, hevur veri› apríl, tá ta› ikki hevur havt møguleikar at vera á tidinum. Landsli›i› hevur spælt sjey dystir í apríl. F‡ra eru taptir, tríggir eru vunnir, og málmunurin er 6-12. Men so skal undirstrikast, at sigrarnir eru vunnir á Kanada, Malta og Liktinstein.

Dysturin ímóti Sveis var tann 11. í oktober. Bara ein er vunnin (3-1 í San Marino í 1995), ein er enda›ur vi› javnleiki (0-0 í Litava í 1998), og tapi› í Zürich var ta› níggjunda oktober tapi›. Samla›i málmunurin í hesum mána›inum er 9-37. Hesa fer› vóru nógvir spælarar ov illa stilla›ir inn á ella tuna›ir inn á avbjó›ingina. Sveis ljó›ar ikki ta› sama sum Spania í altjó›a fótbólti. Møguleikin fyri stórtapi› var ikki stórvegis størri, enn hann var, tá landsli›i› í juni í 1998 var í Estlandi. Ta fer›ina enda›i ta› illa, og solei›is var ta› aftur hesa fer›.

jh